# ARKTISKA RÁÐIÐ

## EIN STUTT VEGLEIÐING

3. ÚTGÁVA
2022



ARCTIC COUNCIL

Henda frágreiðing fæst í tveimum útgávum, prentað og talgilt
ISBN 978-82-93600-91-6 (prentað)
ISBN 978-82-93600-92-3 (talgilt, PDF)

© Skrivstova Arktiska Ráðsins 2022.
Hetta skjal er útgivið við loyvinum "Creative Commons Attribution-NonCommercial 4.0 International License". Sí avrit av loyvinum her:creativecommons.org/licenses/by-nc/4.0

Viðmælt ávísing:
Skrivstova Arktiska Ráðsins, 2022. Arktiska Ráðið: Ein stutt vegleiðing, 3. útgáva. 36 síður.

Høvundur: Skrivstova Arktiska Ráðsins

Útgivið: Skrivstova Arktiska Ráðsins

Skjalið er tøkt í PDF-útgávu í opna dátugrunni Arktiska Ráðsins:
oaarchive.arctic-council.org

Kápumynd: iStock / DmitryND
Forsíðumynd: Finska uttanríkisráðið / Kaisa Sirén

# ARKTISKA RÁÐIÐ

## EIN STUTT VEGLEIÐING



# HETTA ER ARKTISKA RÁÐIÐ.

Arktiska Ráðið er fremsti millumtjóðapallur, ið virkar fyri samstarvi, samskipan og samskifti millum arktisku londini, upprunafólk og aðrar íbúgvar á norðurleiðum um felags arktisk mál við serligum denti á burðardyggari menning og umhvørvisvernd í Arktis.





# HVØR LUTTEKUR?

## ARKTISKU LONDINI

Arktiska Ráðið varð stovnað við Ottawa-yvirlýsingini og limalondini eru:

- Kanada
- Danmarkar Kongsríki – Føroyar og Grønland
- Finnland
- Ísland
- Noreg
- Russland
- Svøríki
- USA

Hesi átta lond eiga øll lut í arktiskum øki, sum tey umsita. Land og hav kring norðpólin eru sostatt fevnd av lóggávu í hesum londum og altjóða rætti. Stívliga fýra milliónir fólk búgva á norðurpólsleiðum. Heilsa og vælvera teirra eru fremsta raðfesting Arktiska Ráðsins.

arctic-council.org/states

## UPPRUNAFELAGSSKAPIR

Føst luttøka frá upprunafelagsskapum er eitt serstakt eyðkenni við Arktiska Ráðnum. Seks felagsskapir fyri upprunafólk eru fastir luttakarar í ráðnum. Avgerð um hetta varð tikin til tess at veita arktiska upprunafólkinum ein virknan leiklut í ráðnum.

Upprunafelagsskapirnir hava fullan samráðingarrætt í sambandi við samráðingar og avgerðir tiknar í ráðnum, og koma við virðismiklum íkasti til virksemið hjá ráðnum á øllum økjum. Teirra luttøka í verkætlanum og átøkum hjá ráðnum er samskipað av Skrivstovu Upprunafólksins.

arcticpeoples.org

arctic-council.org/pps



Aleut International Association (AIA)

Arctic Athabaskan Council (AAC)

Gwich'in Council International (GCI)

Inuit Circumpolar Council (ICC)

Russian Association of Indigenous Peoples of the North (RAIPON)

Saami Council



Kjakfundur um upprunafólkavitan á 10. ráðharrafundi Arktiska Ráðsins í Fairbanks, Alaska, 2017.

SKRIVSTOVA ARKTISKA RÁÐSINS / LINNEA NORDSTRÖM

# ARBEIÐSBÓLKAR OG SERFRØÐINGABÓLKAR

Mesta virksemið hjá ráðnum fer fram í seks arbeiðsbólkum og einum sjálvstøðugum serfrøðingabólki, ið fevna um alskyns málsøki – frá veðurlagsbroytingum og neyðtilbúgving til sálarheilsu og burðardygga menning.

ARCTIC CONTAMINANTS ACTION PROGRAM

## ARCTIC CONTAMINANTS ACTION PROGRAM (ACAP)

**acap.arctic-council.org**

ACAP virkar fyri at fyribyrgja dálking og verja umhvørvið í Arktis. ACAP skipar fyri verkætlanarsýningum, til tess at økja um tilvitanina og vísa á, hvussu dálking kann avmarkast í Arktis. Arbeiðsbólkurin eggjar limalondunum til at menna egnan politikk og gera átøk fyri at minka um dálking og avmarkaváðarnar fyri umhvørvi, heilsu, samfelag og búskap.

## ARCTIC MONITORING AND ASSESSMENT PROGRAMME (AMAP)

**amap.no**

AMAP hevur ábyrgd av at hava eftirlit við og meta um spurningar í sambandi við dálking og veðurlagsbroytingar á norðurleiðum. AMAP ger óheftar, vísindaligar og javnlíkamettar støðumetingar viðvíkjandi dálking og veðurlagsbroytingum í Arktis, sum eru grundarlag undir haldgóðum politiskum ætlanum og avgerðum – til frama fyri vistskipanir og fólkaheilsu í Arktis.

Arbeiðsbólkarnir og serfrøðingabólkurin í sóti og metani (EGBCM) veita eitt breitt og vísindaligt vitanargrundarlag, sum slóðar fyri haldgóðum avgerðum. Harumframt menna teir mannagongdir og tilmæli fyri at tryggja burðardygt virksemi í Arktis.

## CONSERVATION OF ARCTIC FLORA AND FAUNA (CAFF)

**caff.is**

CAFF hevur lívfrøðiliga margfeldið á norðurleiðum um hendi. Bólkurin miðlar granskingarúrslit til ríkisstjórnir og íbúgvar í økinum og virkar fyri mannagongdir, ið tryggja burðardygd fyri livandi tilfeingið í Arktis. CAFF hevur ment eina skipan við tí endamáli, at mál, ið ávirka arktiskar vistskipanir, verða loyst í felag, sum til dømis vøkstur og harvið búskaparligt trýst á vistskipanir, verndarmøguleikar og politiskar skyldur.

## EMERGENCY PREVENTION, PREPAREDNESS AND RESPONSE (EPPR)

**eppr.org**

EPPR hevur ábyrgd av at virka fyri styrktari fyribyrging, tilbúgving, leiting og bjarging í sambandi við umhvørvisvanlukkur og aðrar neyðstøður og vanlukkur. Hóast EPPR ikki er ein tilbúgvingarstøð, skipar bólkurin fyri verkætlanum, ið viðgera vitanarglopp, fyrireika strategiir, veit kunning, savna dátur og samstarva við viðkomandi partar um førleikar og granskingartørv í Arktis.

## PROTECTION OF THE ARCTIC MARINE ENVIRONMENT (PAME)

**pame.is**

PAME er snúningsdepilin í virkseminum hjá Arktiska Ráðnum ið viðvíkur verju og burðardygga nýtslu av arktiska havumhvørvinum. PAME viðger politisk átøk á havøkinum í sambandi við handfaring av umhvørvisbroytingum, sum standast av virksemi bæði á landi og sjógvi. Bólkurin mennir og samskipar strategiskar ætlanir, skráir, støðumetingar og leiðreglur sum ískoyti til verandi skipanir, ið verja havumhvørvi í Arktis.

## SUSTAINABLE DEVELOPMENT WORKING GROUP (SDWG)

**sdwg.org**

SDWG savnar seg um fólkið í Arktis. Bólkurin virkar fyri at verja og stimbra umhvørvið, búskapin, sosialu viðurskiftini og heilsuna hjá upprunafólki og íbúgvum í Arktis. Aðalmálið hjá SDWG er at taka stig til átøk, ið veita praktiska vitan og stuðla undir førleikamenninga hjá upprunafólki og arktiskum samfeløgum til tess at loysa avbjóðingar og gagnnýta teir møguleika, sum eru í økinum.

# EGBCM

## EXPERT GROUP ON BLACK CARBON AND METHANE (EGBCM)

**arctic-council.org/egbcm**

Vegna ávirkanina av útláti frá sóti og metani á veðurlagið í Arktis, samtyktu ráðharrarnir í Arktiska Ráðnum í apríl 2015 virkisætlanina *Enhanced Black Carbon and Methane Emissions Reductions: An Arctic Council Framework for Action.* Ein serfrøðingabólkur í sóti og metani varð settur at seta tiltøkini í virkisætlanini í verk. Serfrøðingarbólkurin skal skriva ein *samandrátt av framstigum og tilmæli* annaðhvørt ár, grundað á frágreiðingar frá limalondunum og aðrar viðkomandi upplýsingar.

## EYGLEIÐARAR

Lond uttan fyri Arktis, millumtjóða- og millumtingasamstørv, altjóða-, økis- og óheftir almannagagnligir felagsskapir, sum Arktiska Ráðið metir kunnu veita íkast til tess arbeiði, kunnu fáa eygleiðarastøðu í ráðnum. Eygleiðarar í Arktiska Ráðnum eru fyrst og fremst virknir í arbeiðsbólkunum.

**13**
Lond uttan fyri Arktis

**13**
Millumtjóða- og millumtingasamstørv

**12**
Almannagagnligir felagsskapir óheftir av politiskum myndugleikum (NGOir)

**arctic-council.org/observers**

Eygleiðarar á SDWG-fundi í Chena, Alaska, USA, 2015.

KSENIIA IARTCEVA / SKRIVSTOVA ARKTISKA RÁÐSINS



# HVAT GER ARKTISKA RÁÐIÐ?

Strategiska ætlanin hjá ráðnum fyri 2021-2030 vegleiðir arbeiðið hjá ráðnum til frama fyri eitt "friðarligt og støðugt øki við dyggum samstarvi, ið er eitt livandi, burðardygt og trygt heim hjá øllum íbúgvum, eisini upprunafólki, hvørs rættindi og vælvera verða vird".

## HVUSSU VIRKAR TAÐ?

Avgerðir í Arktiska Ráðnum skulu samtykkjast einmælt av teimum átta limalondunum í fullum samráði við og luttøku frá upprunafelagsskapunum. Støðumetingar, tilmæli og ætlanir hjá ráðnum eru úrslit av virkseminum hjá arbeiðsbólkunum og eru grundarlag undir haldgóðum avgerðum.

Aðalskrivstova Arktiska Ráðsins lat formliga upp í Tromsø í Noregi í 2013. Hon varð stovnað sum fyrisitingarmyndugleiki við endamáli at vara um stovnsminnið, betra um samskifti og miðling úteftir og at stuðla virkseminum hjá Arktiska Ráðnum sum heild.

Limalondini skiftast um at hava formansskapin í Arktiska Ráðnum í 2-áraskeiðum.

**2025-2027**
DANMARKAR KONGSRÍKI - FØROYAR OG GRØNLAND

**2023-2025**
NOREG

**2021-2023**
RUSSLAND

**2019-2021**
ÍSLAND

**2017-2019**
FINNLAND

**2015–2017**
USA

**2013–2015**
KANADA

**2011–2013**
SVØRÍKI

## HVUSSU ER TAÐ SKIPAÐ?

Formaður Arktiska Ráðsins er uttanríkisráðharrin í landinum við formansskapinum. Tá ið formansskapurin er komin at enda, hittast umboð frá arktisku londunum á ráðharrastigi fyri at eftirmeta arbeiðið og at geva formansskapin víðari. Dagligi raksturin í ráðnum verður umsitin av embætismannanevnd, hesi verða nevnd Senior Arctic Officials (stytt SAO), ið er sett av limalondunum. Embætismannanevndin er undir leiðslu av nevndarformanni, nevndur Senior Arctic Offical Chair, útnevndur av formansskapinum.Verkætlanir og tiltøk eru skipað av arbeiðs- og serfrøðingabólkunum, ið savna saman serfrøðingar og onnur kunnig frá arktisku limalondunum, upprunafelagsskapunum, eygleyðaralondum og øðrum.

## HVAT HEVUR RÁÐIÐ AVRIKAÐ?

Arktiska Ráðið ger víðfevndar og framkomnar umhvørvisligar, vistfrøðiligar og samfelagsligar støðumetingar í arbeiðsbólkunum. Ráðið er eisini ein pallur til samráðingar um tær tríggjar týdningarmestu løgfrøðiliga bindandi samstarvsavtalurnar landanna millum:

- *Samstarvsavtala um leiting og bjarging í Arktis* (Nuuk 2011)
- *Samstarvsavtala um oljutilbúgving í Arktis* (Kiruna 2013)
- *Samstarvsavtala um altjóða vísindasamstarv í Arktis* (Fairbanks 2017)

**arctic-council.org/cooperation**

Tíðum verða arbeiðstoymi, t.e. *task force*, skipað á ráðharrafundum til at arbeiða við ávísum málum í eitt avmarkað tíðarskeið. Tey virka til viðkomandi mál er greitt.

# HVAT GER RÁÐIÐ IKKI?

Arktiska Ráðið er eitt forum, uttan fíggjarætlan til verkæ
átøk. Alt arbeiði og átøk verða fíggjað g
fleiri limalondum. Summar verkætlanir f
Arktiska Ráðið kann ikki áleggja nøkrum
tilmælum. Ábyrgdin liggur hjá einstøku
felagsskapum. Ottawa-yvirlýsingin útilo
millum heimildir Arktiska Ráðsins.

Ottawa-yvirlýsingin útilokar staðiliga hernaðartrygd millum heimildir Arktiska Ráðsins.



Undirritan av samstarvsavtaluni um altjóða vísindasamstarv í Arktis. Á myndini sæst íslendski uttanríkismálaráðharrin, Guðlaugur Þór Þórðarson.

SKRIVSTOVA ARKTISKA RÁÐSINS / LINNEA NORDSTRÖM

# AÐALMÁL Í ARKTIS




ISTOCK / GEORGEBURBA



Les meira um arbeiði Arktiska Ráðsins við lívmargfeldi — sí verkætlanir, les søgur og fá nýggjastu tíðindi:

arctic-council.org/biodiversity

ISTOCK



ISTOCK / SEPPFRIEDHUBER

Sí hvussu Arktiska Ráðið loysir trupulleikar á sjónum – sí verkætlanir, kava niður í søgur og samrøður og fá nýggjastu tíðindi:

arctic-council.org/ocean

# SAMSTARV UM EITT BURÐARDYGT NORÐURÍSHAV

Svinnandi havísurin hevur fingið Norðuríshav á altjóða breddan, tá ið talan er um veðurlagsbroytingar og búskaparligar møguleikar. Opið hav veitir nýggjar møguleikar, men lættari atgongd til norðurøkið kann eisini elva til vandastøður fyri íbúgvar og vistskipanir, til dømis oljudálking og skipaflutningsvanlukkur.

Arktisku londini hava ábyrgd av at tryggja framtíðarmenningina í økinum og at finna mátar at umsita havumhvørvið. Til hetta krevst betri vitan um drívmegina og árinini, sum broyta íshavsumhvørvið, eins og betri samstarv millum londini, íbúgvarnar, ytri áhugapartar og altjóða rættarkarmar.

## ÍKAST ARKTISKA RÁÐSINS

Fyri at verja íshavsumhvørvið og forða fyri møguligum neiligum árinum av veðurlagsbroytingum og dálking viðurkenna arktisku londini, at tørvur er á tøttum samstarvi, og tey samstarva á nógvum økjum, til dømis um:

- havdálking
- burðardyggan skipaflutning
- leiting og bjarging
- havsamstarv



ISTOCK

Les meira um arbeiði Arktiska Ráðsins við tilbúgving og fyribyrging av neyðstøðum – sí verkætlanir, søgur og nýggjastu tíðindi:

arctic-council.org/emergency

# TILBÚGVING OG FYRIBYRGING AV NEYÐSTØÐUM

Umhvørvisliga er Arktis eitt viðkvæmt øki við ógvusligum veðurlagi, ið er sermerkt við bítandi kulda, myrkum vetrum, kava, ísi og frostjørð. Harðar umstøður og lítið og avmarkað undirstøðukervi í stórum pørtum av Arktis økja um váðarnar og gera bjargingararbeiði trupult.

Fyribyrging og tilbúgving skal leggjast væl til rættis frammanundan og lagast til arktisku umstøðurnar og veldigu víddirnar fyri at fáa sum mest burtur úr tøkum tilfeingi. Tí er altjóða samstarv eisini avgerandi.

## ÍKAST ARKTISKA RÁÐSINS

Øktur skipaflutningur, ráevnisforkanningar og títtari skógareldar eru millum vandarnar fyri umhvørvi, íbúgvar og djór á norðurpólsleiðum, sum arbeiðsbólkarnir í Arktiska Ráðnum arbeiða við. Teirra arbeiði er íkast til altjóða sáttmálar, setir leiðreglur og karmar, skapar mannagongdir og fremur samstarv tvørtur um mørk og altjóða felagsskapir. Millum arbeiðsevnini eru:

- oljulekar
- leiting og bjarging
- skógareldar
- váðametingar



Les meira um Arktiska Ráðsins handfaring av dálking og sóti, týningarevnum og havdálking – sí verkætlanir, les søgur og fá nýggjastu tíðindi:

arctic-council.org/pollution

ISTOCK / SODAR99

# ALTJÓÐA SAMSTARVSMENNING



Stovnanin av Arktiska Ráðnum varð mett sum týdningarmikil varði, ið menti samstarvið í Norðri.

Við Ottawa-yvirlýsingini grundaðu tey átta arktisku londini ráðið sum pall á høgum stigi til frama fyri samstarv, samskipan og samskifti landanna millum – í fullum samráði við og luttøku frá upprunafólkinum og øðrum íbúgvum í Norðri.

## ARKTIS – EITT ØKI VIÐ SERSTØKUM ALTJÓÐA SAMSTARVI

Síðani Arktiska Ráðið varð stovnað í 1996, hevur tað virkað sum pallur og miðil fyri felags loysnum til felags avbjóðingar í limalondunum – við serligum denti á umhvørvisvernd og burðardyggari menning. Við árunum er ráðið vorðið fremsti pallurin í Arktis fyri viðgerð av hesum evnum, og Arktis er vorðið eitt øki við serstøkum altjóða samstarvi.

Samstarvið fevnir um tey átta limalondini, seks felagsskapir fyri upprunafólk við fastari luttøku í ráðnum, seks arbeiðsbólkar og næstan 40 lond og felagsskapir sunnan fyri pólkringin, sum hava eygleiðarastøðu í ráðnum.

Norska uttanríkisráðfrúgvin Ine Marie Eriksen Søreide skrivar undir felags ráðharrafráboðan á 11. ráðharrafundi Arktiska Ráðsins í Rovaniemi í 2019.

JOUNI PORSANGER / FINSKA UTTANRÍKISRÁÐIÐ

# FYLG VIÐ ARBEIÐI ARKTISKA RÁÐSINS

## ARKTISKA RÁÐIÐ
fb.com/arcticcouncil

twitter.com/arcticcouncil

flickr.com/arctic_council

instagram.com/arcticcouncil

soundcloud.com/arcticcouncil

vimeo.com/arcticcouncil

## FORMANSSKAPUR
twitter.com/saochair

## SKRIVSTOVA UPPRUNAFÓLKSINS
fb.com/indigenouspeoplessecretariat

instagram.com/indigenous_peoples_secretariat

## ACAP
twitter.com/acap_arctic

vimeo.com/acaparctic

## AMAP
fb.com/amapsecretariat

twitter.com/amap_arctic

instagram.com/amap

vimeo.com/amap

## CAFF
fb.com/caffs

twitter.com/caffsecretariat

flickr.com/caff_arctic_biodiversity

instagram.com/caff_arctic_biodiversity

youtube.com/caffbiodiversity

## EPPR
twitter.com/eppr_arctic

instagram.com/eppr_arcticcouncil

vimeo.com/eppr

## PAME
fb.com/pame.secretariat

twitter.com/pamesecretariat

## SDWG
fb.com/sdwgsecretariat

twitter.com/sdwg_chair

## AIA
fb.com/aleutinternational

twitter.com/aleut_aia

## AAC
fb.com/arcticathabaskancouncil

ICC
fb.com/
inuitcircumpolarcouncilalaska

fb.com/canadaicc

fb.com/icc.greenland

twitter.com/icc_alaska

twitter.com/icc_canada

twitter.com/icc_greenland

instagram.com/iccalaska

GCI
fb.com/gwichincouncil

twitter.com/gwichincouncil

RAIPON
fb.com/raipon.indigenous

instagram.com/raiponofficial

SÁMARÁÐIÐ
fb.com/saamicouncil

twitter.com/saamicouncil

instagram.com/saamicouncil

Melda teg til tíðindabræv frá Arktiska Ráðnum og fá nýggjastu tíðindini í postkassan:

**arctic-council.org/newsletter**



ISTOCK / STOCK_COLORS

# VANLIGAR STYTTINGAR Í ARKTISKA RÁÐNUM

| | |
|---|---|
| AAC | Arktiska Ráð Athabaska |
| AACA | Tillagingarátøk fyri einum skiftandi Arktis |
| ABA | Støðumeting av lívmargfeldi í Arktis |
| ACAP | Arbeiðsbólkur: Arktisk átøk ímóti dálking |
| ACGF | Pallur fyri arktisku bjargingartænastuna |
| ACIA | Støðumeting av ávirkan av arktiska veðurlagnum (AMAP, 2005) |
| ACS | Skrivstova Arktiska Ráðsins |
| AEC | Arktiska Búskaparráðið |
| AIA | Altjóðasamband Aleuta |
| AMAP | Arbeiðsbólkur: Arktisk vøka og greining |
| AMBI | Átak fyri arktiskar flytifuglar (CAFF) |
| AMSA | Støðumeting av arktiskum skipaflutningi (PAME, 2009) |
| AORF | Pallur fyri arktisk frálandaumsjónarfólk |
| ARR | Arktisk mótstøðufrágreiðing / Arktisk mótstøðulýsing |
| ASDS | Dátutænasta fyri arktiskan skipaflutning (PAME) |
| ASTD | Upplýsingar um arktiskan skipaflutning (PAME) |
| CAFF | Arbeiðsbólkur: Náttúruvernd í Arktis |
| CBMP | Lívmargfeldisvøka á norðurpólsleiðum (CAFF) |
| CLEO | Netverk fyri staðbundnar umhvørviseygleiðarar (ACAP) |
| EA | Vistskipanarlig tilgongd (til umsiting) |
| EG | Serfrøðingabólkur |
| EGBCM | Serfrøðingabólkurin í sóti og metani |
| EPPR | Arbeiðsbólkur: Neyðtilbúgving |
| ERMA | Umhvørvistilbúgvingarskipan (EPPR) |
| GCI | Altjóðaráð Gwich'in tjóðarinnar |
| HFO | Tung brenniolja (PAME) |

| | |
|---|---|
| ICC | Arktiska Inuittaráðið |
| IPCAP | Serfrøðingabólkur upprunafólka í átøkum ímóti dálking (ACAP) |
| IPS | Skrivstova upprunafólka |
| MFA | Uttanríkismálaráð |
| MOSPA | Samstarvsavtala um oljutilbúgving í Arktis (2013) |
| PAME | Arbeiðsbólkur: Havumhvørvisvernd í Arktis |
| POP | Varandi lívrunnin dálking |
| PP | Fastur luttakari |
| PSI | Verkætlanarstuðulsamboð |
| RAIPON | Upprunafólkasamband Norðurrusslands |
| RRFP | Økismóttøkuskipan (PAME) |
| SAMBR | Støðumeting av havmargfeldi í Arktis (CAFF) |
| SAO | Embætismannanevndarlimur |
| SAOC | Embætismannanevndarforfólk |
| SAON | Netverk fyri samskipan av eygleiðingarskipan |
| SAR | Leiting og bjarging |
| SCTF | Arbeiðstoymi fyri betri altjóða vísindasamstarvi í Arktis |
| SDI | Undirstøðukervi fyri rúmdátur |
| SDWG | Arbeiðsbólkur: Burðardygg menning |
| SLCF | Stokkutir veðurlagsávirkarar |
| SWIPA | Kavi, vatn, ísur og frostjørð í Arktis |
| TF | Arbeiðstoymi |
| TKLK | Siðbundin vitan og staðbundin vitan |
| WG | Arbeiðsbólkur (hjá Arktiska Ráðnum) |

ARCTIC COUNCIL

Arctic Council Secretariat
Fram Centre
NO-9296 Tromsø Norway
Tel: +47 77 75 0140
acs@arctic-council.org
arctic-council.org